# Ferjulegan má ruddast

*Tað er ikki heilt vandaleyst at ferðast við Ternuni I um ferjuleguna á Toftum. Tung ferðsla og nógv órudd er á økinum, har ferðafólkini ganga*



*Fólk halda tað ikki vera nóg trygt at ferðast um ferjuleguna á Toftum* *Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Toftir:** Viðurskiftini á ferjuleguni á Toftum eru langt frá tí, krevjast kann av einum staði, har nógv fólk ferðast dagliga. Nógv tung ferðsla til og frá Fiskamarknaðinum, og nógv órudd á bryggjuni, sum ferðafólkini ganga og dreiva uppií.

Klokkkan er tíggju minuttir í fimm seinnapartin ein vanliga hósdag á Toftakei.

Tað liggur ein trolbátur og bøtir trol við skráan við ferjuleguna á Toftum. Teir hava drigið trolið niðan eftir skráanum og lagt tað inn eftir bryggjuni.

Tað er júst, sum tað vanliga verður gjørt, bara við tí undantaki, at um lítla løtu kemur strandfaraskipið Ternan I at seta fólk av júst her. Og so skulu øll tey fólkini ganga niðan gjøgnum hetta økið fyri at sleppa í bussarnar, sum standa langt uppi móti vegnum, tí teir ikki sleppa heilt oman.

Ternan I kemur undan grótkastinum og ger eitt floyt, so teir, sum bøta, vita av, at nú skulu teir flyta. Teir skunda sær at loysa bátin og leggja hann framman fyri Fiskamarknaðinum.

Ternan I leggur at, og lúkan fer niður. Fólk skunda sær í land, men noyðast at »krússa« millum trolnet, grunnlínur, bobbensar og harraleysar handskar, sum liggja á økinum framman fyri ferjuleguni.

Ein stórur lastbilur við viðfestivogni fer frá Fiskamarknaðinum. Hann er á veg til Havnar, haðani innihaldið, sum er ísfiskur, skal avskipast til Englands. Ein truckur koyrir aftur og fram við plattum og køssum. Øllum hesum skulu ferðafólkini frá Ternuni I ansa eftir, meðan tey ganga niðan til bussin.

Bussførararnir eru ikki tryggir, sum støðan er. Teir vilja fegnir vita, hvør hevur ábyrgdina, um eitthvørt óhapp hendir. Eru tað teir, sum sleppa fólki úr bussinum. Er tað skiparin á Ternuni I. Strandferðslan ella Nes Kommuna, sum eigur økið, ferjulegan er á? Av Arbeiðseftirlitinum verður sagt, at tey eru ikki heilt greið yvir, hvar slík ábyrgd skal leggjast, og vilja tí ikki siga nakað nágreiniligt um málið.

Men ferðafólkaleiðarin á Strandfaraskipum Landsins er ikki í iva.

»Eigarin av lendinum hevur fulla ábyrgd.«

Tað vil siga, at so er tað Nes Kommuna, sum skal syrgja fyri, at tað er trygt hjá ferðafólki at ferðast eftir økinum, har ferjulegan liggur.

Kommunuskrivarin hjá Nes Kommunu, Alfred Olsen, sigur, at tey er greið yvir støðuna og royna at hjálpa upp á hana.

Tey skilja væl báðar partar, sigur hann. Trolbátarnir brúka økið, tí tað er so lætt at draga trolið upp eftir skráanum. Og ferðafókini hava ampa av óruddinum.

Nes Kommuna arbeiðir við at loysa málið soleiðis, at trolbøtingin verður flutt inn í Oyrar, har gamla turkihúsið var. Har skal byggjast høll, so teir fáa verið undir taki, tá arbeitt verður, sigur Alfred Olsen.

Men alt er ein spurningur um prioritering. Eisini ein slík høll. Og enn er hon so ikki komin, sigur Alfred Olsen, kommunuskrivari hjá Nes Kommunu.

# Gistingarhúsini fáa ov lítlan part av ferðavinnuni

*Tað fellur alt ov lítil partur av ferðaferðavinnuni til gistingarhúsini í Suðuroy, sigur leiðarin á Gistingarhúsinum við Á í Øravík*




EDVARD JOENSEN

**Øravík:** Tað koma so fá ferðafólk til Gistingarhúsið við Á í Øravík mitt um summarið, at hotellið kundi næstan tað sama verið stongt, sigur Uni Mortensen, dagligur leiðari.

Tað gekk væl fyrru helvt av árinum, men tá komið var út í hálvan juli, var tað líkasum, at alt steðgaði upp, sigur hann.

Og tað gjørdi tað í grundini eisini. Soleiðis at skilja, at tá fór vinnulívið í summarfrí, og so hildu gistingarnar uppat.

Uni Mortensen sigur, at Gistingarhúsið livir av vinnukundum, sum koma til Suðuroyar í arbeiðsørindum. Tað eru fyri tað mesta føroyingar, sum gista á hotellinum. Men eisini onkur danskur ferðaseljari kemur framvið, letur hann at.

Men fremmand ferðafólk síggjast sjálvdan. Og tað harmar Una Mortensen, at soleiðis er.

Um grundina sigur hann, at tað er líkt til, at ferðafólk fara ikki ov langt frá Havnini og miðstaðarøkinum sum heild. Hann heldur rætt og slætt, at tað er av ov lítlari markanðarføring, at soleiðis er. Bæði vinnan sjálv í Suðuroynni og ferðavinnan sum so, Kunningarstovan og Ferðaráðið, eru ivaleyst ov vánalig til at marknaðarføra teir møguleikar, sum eru í oynni.

Og ikki hevur tað almenna hjálp til, sigur Uni Mortensen. Hann vísir á, at meðan Smyril sigldi til Aberdeen, vitjaði heilt væl av fremmandafólki Gistingarhúsið. Tey komu í land, tá Smyril legð at á Drelnesi og vórðu so verðandi í fleiri dagar í oynni.

Tá bar eisini til at skipa fyri ymsum tiltøkum sum eitt nú útferðum, tí tá vistu tey, at her var nóg mikið av fólki at fara við.

So varð tann rutan avhøvdað av politiska myndugleikanum, og við henni hvarv ein heilt stór inntøkukelda hjá Gistingarhúsinum.

Í dag er tað nógv meira tilvildarligt, hvør kemur framvið, sigur Uni Mortensen.

At so Smyril liggur á Drelnesi og bjóðar ferðafólki koyggju, er beinleiðis ójøvn kapping við almennum pengum, sigur Uni Mortensen, sum ikki dylur sína misnøgd við støðuna.

Hóast søla av gistingum er høvuðsvinnuvegurin hjá Gistingarhúsinum við Á í Øravík, sigur Uni Mortensen tó, at tey hava onkrar aðrar spennandi ætlanir í hettuni, nú veturin aftur nærkast.

Húsið er bygt út við eini hampiliga stórari veitsluhøll, og har verða eitt nú brúdleyp hildin, sum sjálvandi geva eitt íkast til rakst-urin.

Men hølið kann saktans brúkast til annað enn brúdleyp og ráðstevnur. Tað ber væl til at skipa fyri almennum tiltøkum við mati og dansi til dømis. Soleiðis fyri tey, sum eru vorðin eitt sindur ov tilkomin til at fara í diskotek í TB húsinum.

- Tann møguleikin er avgjørt til staðar, sigur Uni Mortensen, sum metir, at suðringar eins og onnur fólk ivaleyst høvdu farið út eitt kvøld soleiðis av og á at hugna sær.

Uni Mortensen sigur, at avtalan um oljuhavnina á Drelnesi er avgjørt at frøast um. Hann væntar heilt vist, at tað fer at dryppa eitt sindur á gistingarhúsini í oynni eisini, tá virksemið har kemur í gongd.

Men sum er, er støðan tann margh™áttliga, at skuldi Gistingarhúsið verið stongt eina tíð, skuldi tað avgjørt verið ta tíðina, vanliga verður nevnd háárstíð. Frá hálvum juli og einar tríggjar vikur fram.

Tá er stutt og greitt alt ov lítið at gera á Gistingarhúsinum við Á í Øravík.

# Norðurlond ósamd um hvalaveiðuspurningin

*Í gott hálvt ár hava norðurlondini arbeitt við at orða eina ætlan um, hvussu londini skilabest kunnu menna seg í framtíðini. Men nú fyrsta útkast til ætlanina er liðugt, hevur Svøríki tikið fyrivarni fyri einum parti av ætlanini. Hetta er parturin um vernd og nýtslu av havsúgdjórum, og hann hava føroyingar skrivað*



RÚNAR REISTRUP

Síðan desembur mánað í fjør hevur Føroya Landsstýrið verið umboðað í einum norðurlendskum samstarvsbólki, ið hevur arbeitt við einari sokallaðari »felags norðurlendskari ætlan fyri burðardyggari menning«.

Fyrsta útkast til ætlanina er júst greitt úr hondum, og verður nú sent ymsum felagsskapum í norðurlondum til ummælis. Millum føroysku felagsskapirnar, ið fáa ætlanina til ummælis, eru Kommunufelagið, Reiðarafelagið og Bóndafelagið umframt onnur.

Felags norðurlendska ætlanin um burðardygga menning er ein langtíðarætlan fyri, hvussu noðurlondini í framtíðini skulu troyta síni tilfeingi, verja umhvørvið og sum heild seta eina felags kós frameftir.

### Avtala felags hugburð

Arbeiðið við at gera ætlanina krevur sostatt, at norðurlondini semjast soleiðis nøkunlunda um hvønn hugburð tey skulu hava til ymisk stórmál sum til dømis nýtslu av ríka fiskatilfeinginum, matvørudygd og orkuframleiðslu.

Eitt annað av yvirornaðu viðurskiftunum, ið norðurlondini skulu semjast um í hesum sambandi, er spurningurin nýtslu av tilfeinginum av súgdjórum í havinum kring okkum.

Og her liggur ein av ósemjunum, ið forðar arbeiðinum við ætlanini um burðardyga menning í norðurlondum. Svøríki tekur nevniliga fyrivarni fyri tí, ið stendur í útkastinum til felags hugburð í norðurlondum um veiðu og verju av havsins súgdjórum.

Hendan partin av avtaluni hava føroyingar orðað í samstarvi við Ísland, og tí harmar tað ikki sørt landsstýrið, at sviar í seinastu løtu valdu at lýsa sítt fyrivarni fyri tí, ið stendur í hesum partinum av útkastinum til ætlanina.

### Havsúgdjór eiga at gagnnýtast

Norðurlondini hava hvør í sínum lagi skrivað samráðingaruppkøst til ymsu partarnar av heildarætlanini, ið tey kenna best. Føroyar og Ísland fingu litið upp í hendi at skriva samráðingaruppkast til heildarætlan um havtilfeingi. Harí lá eisini at gera samráðingaruppskot um tilfeingið av havsúgdjórum, og tað var hesin partur, ið sviar kendu seg noyddar at taka fyrivarni fyri.

Í útkastinum hjá føroyingum og íslendingum til langtíðarmál fyri burðardyggari menning innan veiðu av havsúgdjórum stendur sum høvuðsmál, at innan tey komandi 20 árini skal norðurlendski politikkurin viðvíkjandi havsúgdjóraveiðu mennast samsvarandi tí hugburði, at havsúgdjór eiga at gagnnýtast við tí fyriliti, at hetta ikki skal ávirka stovnin meira enn ráðiligt er.

Í útkastinum stendur víðari, at norðurlond í framtíðini skulu samstarva í altjóða høpi við tí fyri eygað at tryggja varðveistlu og burðardyggari nýtslu av havsúgdjóratilfeinginum.

### Landsstýrið harmast

Í tíðindaskrivi frá Uttanlandsdeildini hjá Føroya Landsstýri verður harmast um, at Svøríki hevur tikið fyrivarni fyri tí, sum Ísland og Føroyar hava lagt upp til í útkastinum til avtaluna.

Hetta málið verður nú neyðugt at loysa á politiskum stigi, áðrenn tað kann gerast partur av felags norðurlendsku heildarætlanini fyri burðardyggari menning.

Tann endaliga útgávan av hesi heildarætlan skal ætlandi leggjast fyri Norðurlandaráðið at samtykkja á ársfundinum, sum verður í novembur í ár. Ætlanin skal so koma í gildi við ársbyrjan komandi ár.

# Lurtararnir og teir

*Ætlanin er at geva áhoyrarunum eina nærverandi uppliving, tá Teitur Lassen og tveir royndir danskir tónleikarar fara at fylla eitt »Listening Room« við tónum og samrøðu*

RÚNAR REISTRUP

Um vikuskiftið fara tríggir tónleikarar at ferðast til trý ymisk støð í landinum at skipa fyri sokallaðum »Listening Room«.

Teir tríggir eru Teitur Lassen og danirnir Henrik Strube og Michael Friis, og tey trý støðini eru »Virkið« á Sandi, Norðurlandahúsið í Havn og »Atlantis« í Klaksvík.

Hetta »Listening Room« ið tónleikararnir ætla at skapa er ein meira óformellur háttur at framføra løg enn vanligar konsertir. Hendan konsertin stílar ímóti tøttum sambandi millum áhoyrararnar og tónleikararnar. Tónleikararnir sita ikki bert og spæla, men úttrykkja seg á fleiri hættir.

Tiltakið »Aldarinnar gongutúrur«, sum Teitur Lassen og Edvard Nyholm Debes skipaðu fyri í Meiðarínum herfyri, var ført í nøkunlunda sama stílið sum »Listening Room« hjá teimum trimum Lassen, Strube og Friis.

### Norðurlandahúsið kring landið

Fyriskiparin av konsertini er Norðurlandahúsið. At konsertin ikki bara verður í Havn, men eisini á Sandi og í Klaksvík er liður í átakinum hjá Norðurlandahúsinum at koma út um sjálvt húsið.

Í hesum sambandi keypti Norðurlandahúsið ein lítlan buss fyrr í ár. Bussurin er útgjørdur sum konsertbussur, har pláss er fyri nógvari útgerð av alskyns slag umframt tónleikarum og teknikkarum.

Tá farið verður til Sands at spæla fyrstu konsertina, er tað fyrstu ferð at bussurin rættiliga verður royndur til tað endamálið, hann er ætlaður til.

Fyrsta »Listening Room« við Teituri Lassen, Henrik Strube og Michael Friis verður í »Virkinum« á Sandi komandi hóskvøld klokkan 21.00.

Fríggjakvøldið klokkan 19.30 er konsert í Norðurlandahúsinum, og leygarkvøldið klokkan 21.00 verður triðja og seinasta konsertin á ferðini í Atlantis í Klaksvík.




Til landsdyst í Zürich

**Sveis - Føroyar**

**Beinleiðis úr Vágum**

**Stuðlið landsliðnum og njótið harafturat 9 dagar í bergtakandi landinum, frá 4. til 12. okt.**

**Fráferð:** Beinleiðis úr Vágum til Zürich tann 4/10 kl. 17.30
**Heimaftur:** Beinleiðis úr Zürich í Vágar tann 12/10 kl. 21.45

**Gisting:** Gist verður í 9 dagar/8 nætur í Sveis, møguleiki er at velja ímillum 2 trístjørnað hotell mitt í gamla býnum.

**Útferðir:** Skipað verður eisini fyri útferðum (ikki íroknað prísin)

Kostnaður:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **9.550,-** |
| **Hotel Scheuble** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.735,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á einkultkamari | kr. | **8.590,-** |
| **Hotel Adler** | fyri hvønn á dupultkamari | kr. | **7.100,-** |

**Íroknað prísin er:** Flogferð, gisting við morgunmati, bussflutningur frá flogvølli til hotell og aftur, bussflutningur frá hotell til stadion og aftur, atgongumerki til dystin og ferðaavgjøld.

Seinasta freist at tekna seg er 4/9-2000

Atlantic Airways

tel 333 900 • fax 333380

SANSIR